# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hans Petur Jespersen 80 ár



Leygardagin 28. januar fyllir Hans Petur Jespersen á Lágargarði í Havn 80 ár.

Flestu havnarfólk kenna Hans Petur frá Restorffs Bryggjarí, har hann arbeiddi í umleið 40 ár. Men eisini frá mongum góðum og hugnaligum løtum saman uttan fyri arbeiðsplássið, har Jespersen, sum mong eisini kalla hann, oftani varð mittpunktið, hann, sum savnaði fólk rundan um seg og hann, sum fólk virdu og lurtaðu eftir. Hóast nógv einsamallur var hann tó altíð partur av felagsskapinum.

Hans Petur er av Valinum á Tvøroyri. Foreldrini vóru: Sigrid, f. Olsen, úr Halgabyrgi á Sandi, og Frederik Jespersen, vanliga nevndur Frederik hjá gamla-Jaspuri, sum var millum tey fyrstu, ið settu seg niður á Valinum. Valurin á Tvøroyri var fyrsti veruligi arbeiðarabýlingur í Føroyum, og fólkið har livdi mangan undir sera trongum korum.

Sigrid og Frederik fingu fýra børn. Elst var Marin Elisabeth, hon doyði av tuberklum sum 20 ára gomul, síðan var tað Charles og Anna, tey eru bæði deyð, Anna doyði í fjør. Hans Petur var yngstur av systkjunum og tann einasti, sum er eftir á lívi.

Hjúnalagið hjá Sigrid og Frederik helt ikki, og Sigrid flutti við øllum fýra børnunum til Sands at búgva hjá foreldrunum. Í 1935 doyr mamman, Sigrid, og øll børnini fóru aftur til Tvøroyrar at búgva, uttan Hans Petur, sum fór til Velbastaðar.

Eftir kríggið fór Hans Petur aftur til Tvøroyrar, har hann arbeiddi hjá T. F. Thomsen í nøkur ár. Fyrst í 50-unum kom hann til Havnar og fekk arbeiði hjá Restorffs Bryggjarí. Hetta bleiv hansara lívsstarv. Hann hevði nógvar ymiskar uppgávur har, hann var raskur og arbeiðssamur, m.a. var hann nógv við í bilinum, sum koyrdi øl og sodavatn út til handlarnar í býnum. Hann arbeiddi har, til hann kom til pensiónsaldur. Seinni fór heilsan at bila, og síðan 1999 hevur Hans Petur búð á Miðstovuni á Lágargarði, har tey gera alt fyri at hjúkla um hann. Hóast høgan aldur og viknandi heilsu so er Jespersen, framvegis tann sami gamli Jespersen, ið dámar at speireka og skemta, tá okkurt er á vási. Altíð klárur við eini skjótari og speiskari viðmerking, sum fær lív í vinir og kenningar og tey, sum annars eru um hann.

Vit ynskja Jespersen ein góðan 80 ára føðingardag og mong góð ár enn. Tøkk til starvsfólkini á Miðstovuni og Lágargarð fyri, at tit eru so góð við Hans Petur og taka tykkum so væl av honum.

**Vinir**

## Katrin Holm 60 ár



Leygardagin 21. januar gjørdist Katrin Holm í Havn 60 ára gomul.

Føðingardagin helt hon í Barcelona, har hon var á dómaraskeiði í estetiskum fimleiki fyri Fimleikasamband Føroya. Dagin eftir var hon millum áskoðararnar á Camp Nou til dystin millum Barcelona og Alaves. Einki løgið í hesum – tí ítróttinum hevur Katrin altíð víst stóran ans, og man hon eisini eiga mong sporini bæði í Gundadali og úti á Stórheyggi.

Katrin varð fødd og vaks upp í Skálum í Hvalba. Foreldrini vóru Betta og Niels Pauli Holm, vanliga nevndur Palliba. Systkinaflokkurin taldi 6, har Katrin var tann elsta. Palliba sigldi sum 1. stýrimaður við ymiskum donskum reiðaríum, meðan Betta tók sær av børnunum. Sum 16 ára gomul flutti Katrin til Havnar at arbeiða. Fyrst sum kassadama hjá P.A. Restorff og síðani í Samvinnufelagnum.

Í Havn møtti hon ítróttarúrmælinginum Tórður Holm, sum hon giftist við í 1964. Saman fingu tey børnini Ingilín, Borgarhjørt og Hall. Ingilín starvast sum fysioterapeutur hjá Stimbur. Hon er gift við Jákup Símuni Simonsen úr Hoyvík, og eiga tey døturnar Karin og Elisabeth. Borgarhjørt býr í Ribe, har hon er lærari. Hon er gift við Carsten Lund, og hava tey tríggjar døtur: Maria, Catharina og Anna Tóra. Hallur er bókhaldari hjá Norðbil. Hann býr í Streymnesi saman við Jensinu Magnussen. Tey eiga tveir dreingir - Steingrímur og Fríði.

Katrin gekk, sum flest allar aðrar kvinnur tá, heima hjá børnunum. Seinni bleiv hon vikarur í Nonnuskúlanum, har hon fyri tað mesta undirvísti í fimleiki. Nøkur ár var hon eisini fast í forskúlanum hjá Nonnunum. Í 1986 fekk hon fast starv í umsitingini hjá Tórshavnar Kommunu.

Hesi árini Katrin hevur verið hjá kommununi, hevur mangan verið sera torført at fáa ansingarpláss til børnini. Her var Katrin – áðrenn Snarskivan var sjósett – sum pláss-ávísari andlit kommununnar úteftir, og mangt glepsið man hon eisini hava fingið frá ørkymlaðum havnarfólki. Seinnu árini hevur Katrin livað saman við Jens Mariusi Poulsen í Havn.

## Premierløjtnantur



16. des. 2005 bleiv Arnhold Olavsson av Tvøroyri premierløjtnantur í donsku sjóverjuni.

Hann hevur frá 18. des. 2005 til 23. januar 2006 verið í tænastu í Irak, sum hernaðarlækni hjá donsku hernaðardeildini í Irak.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **André Mellemgaard Jacobsen, Klaksvík**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í kvøld, fríggjakvøldið klokkan 18 heim í Betesda. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13.

**Ingemann Krabenhøft, Skopun**, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum mikudagin 25. januar 65 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálptu okkum, tá ið kæri maður mín, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Ingálvur av Reyni**

andaðist og varð jarðaður.

Vit takka øllum, ið fylgdu Ingálvi til hansara seinasta hvíldarstað her á foldum.

*Fyri tey avvarðandi*

**Elsa**
**Kári, Gunnvør, Heri, Eyðun,**
**Árni, Ása og Inga**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu tá

**Elinborg Mørk Jørgensen**

so brádliga andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Sandvíkar kirkju.

Takk til Erik Bock prest, til kirkjutænarar og onnur í Helligkors kirkju, tøkk til berarar og tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Hjartaliga tøkk øll somul við ynski um eitt gott nýggjár.

**Torgerð og Aslaug**

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við